tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 30.09.2021 kl. 17:00
**Málnr.:** 30.09.2021

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer, Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen

Varalimir:

Ikki møtt: Bjarni Hammer møtti kl. 17:30

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

Fundurin byrjar kl. 17:20
(Hesin fundur er hildin har samtyktirnar vera dagførdar manuelt orsakað av at telduskipanin og internetið hjá Tvøroyrar kommunu er óvirkið)

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 48/21 | | Fíggjarætlan -FÆ2022 1. viðgerð ásetan av skatta % og barnafrádrátt. |
| 49/21 | | Suðuroyar barnaverndartænastan BVT -hølisviðurskiftir 2021 |
| 50/21 | | Umsókn um frávik í byggisamtyktini til íbúðarbygningar -Matr.nr 502a, Kirkjubrekkan |
| 51/21 | | Starvsfólkadagur/jólaborðhald 2021 |
| 52/21 | | Barnaverndartænastan BVT -eykajáttan 2021 |
| 53/21 | | Barnaverndartænastan BVT -hagtøl 2020 |
| **Til kunningar** | | |
| 25/21 | 21/00035-1 | Skattatøl 2021 |
| 26/21 | | IRF-Ársaðalfundur 2021 |
| 27/21 | | Føroya Bjór -umsókn um leigu av Koldepotinum |

Kristin Michelsen, lesur upp skránna og spyr um viðmerking er til hesa.

Súsanna Bertholdsen og Kristina Roest taka ikki undir við skránni, tí at málið val av stýrislimum í Bú- og heimatænastuna BHS ikki er á skrá, ið er ynskt.

Kristin Michelsen greiddi frá at eftirmetingarfundur hevur verði í Kommunufelagnum 29. September 2021 av samstarvinum Bú- og heimatænastuni, har m.a. val av stýrislimum er til viðgerðar. Tí hevur borgarstjórin valt ikki at seta málið á skrá.

**Til støðutakan 48/21**

**Fíggjarætlan –FÆ2021, 1. viðgerð ásetan av skatta% og barnafrádrátt.**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.08.2021 | 46/21 |
| 2 Býráðið | 26.08.2021 | 21/21 |
| 3 Fíggjarnevndin | 27.09.2021 | 47/21 |
| 4 Býráðið | | |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 22.08.2021)**
Mælt verður til at byrja uppá uppskot til fíggjarætlan 2022 og at fíggjarætlanin verður ætlandi viðgjørd av sum niðanfyri:

- 23. august verður áheitan sent til allar nevndarform/kv. og deildarleiðarar um at byrja uppá fíggjarætlan fyri 2022.

- 30. September, uppskot/kunning til fíggjarætlan "FÆ2022" verður viðgjørd á býráðsfundi 30 september, har ásett verður inntøkumetingar, barnafrádrátt og skattaprosent.

- 28. Oktober, 1. viðgerð verður at leggja fyri býráðið til samtyktar 28. Oktober.

- 25. November, 2. viðgerð, *-fíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. Desember-*, verður viðgjørd á býráðsfundinum, sum er lýstur at vera 25. November.

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

- *Samb. løgtingslóg um kommunustýri er ásett í § 39, at fíggjarárið er frá 1. januar til 31. desember. Fíggjarnevndin skal fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið.*
    - *Stk. 2. Kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.* ***Fíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. desember.***

**Fíggjarligar avleiðingar:** Fíggjarætlan fyri 2022

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 26. august 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað. Einmælt samtykt at 2. viðgerðin av fíggjarætlan verður í døgunum 14,15& 16 november.

**Kommunustjórin 10. september 2021:**
Samb. Fráboðan frá TAKS, er skattainntøkur fyri 2022 mettar at blíva: **kr. 64.687.138,-**

**Skattagrundarlag:**

| | | |
|---|---|---|
| A-inntøka: | 350.498.500,- | |
| B-Inntøka: | 17.756.300,- | 368.254.800,- |
| Botnfrádráttur: | | (41.048.398,-) |
| FAS-Inntøka: | (6.456.829,-) | |
| Inntøkufrádr.: | (205.205,-) | |
| Sjófrádr.: | (2.381.026,-) | (9.043.060) |
| **Inntøkugrundarlag:** | | **318.163.342,-** |
| Komm.skatt: (20,9%) | 66.496.138,- | |
| Barnafrádráttur: (398 x 7.000,-) | (2.786.000,-) | |
| Pensionistafrár: (341 x 3.000,-) | (1.023.000,-) | |
| **Netto A-skattur:** | | **62.687.138,-** |
| P/F Skattur: | 2.000.000,- | 2.000.000,- |
| **Mettar inntøkur í alt (2022)** | | **64.687.138,-** |

Borgarstjórin mælir til, at galdandi fyri skattaárið 2022 verður ásett sama skattaprosent og sami barnafrádráttur, ið hevur verði galdandi í skattaárinum 2021.

Tilmælið fyri skattaárið 2022 er, at inntøkugrundarlagið fyri Fíggjarætlanina fyri 2022 verður grunda á:

- Kommunuskattur 20,9%
- Barnafrádráttur kr. 7.000,-

  P/F skattur kr. 2.0 mió.

**Fíggjarnevndin 27. september 2021:**
Mælt verður til at halda sama skattaprosent og barnafrádrátt galdandi fyri ár 2022, ið var samtyktur í 2021, málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 30. september 2021:**
Einmælt samtykt at áseta skattaprosent galdandi fyri 2022 á 20,9% og barnafrádráttin til kr. 7.000,-

## 49/21 Suðuroyar barnaverndartænastan BVT -hølisviðurskiftir 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 14.09.2021 | 24/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 27.09.2021 | 50/21 |
| 3 Býráðið | | |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 9. September 2021)**
Umsitingin hevur hin 31. August móttikið teldupost frá leiðaranum av BVT Suðuroyar Barnaverndartænastu, sum saman við stýrinum fyri Suðuroyar barnaverndartænastu, arbeitt í longri tíð við at kannað møguleikar fyri at betra um núverandi hølisumstøður hjá BVT

Boðað ver frá, at nú er komi somikið áleiðis við ætlanini at betra um hølisumstøðurnar, at tilmæli frá stýrinum og umsitingini á barnaverndartænastuni, er búgvið til at leggja fyri allar kommunur í samstarvinum at játtað.

Neyðugt er, at hetta verður avgreitt skjótast tilber, tá leigusáttmálin við núverandi útleigara er uppsagdur til 1 nov. 2021.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 30 frá 26. mars 2021 (Barnaverndarlógin)

**Fíggjarligar avleiðingar:** Ongin játtan er avsett til víðkan av hølisviðurskiftum hjá BVT fyri FÆ2021, og krevur hetta eykajáttan

- *TVK hevur samlaða játtan á kr. 2.54 mió. til BVT í FÆ2021 samsvarandi 37,54% av rakstrinum fyri BVT (Býtislykilin er eftir fólkatalinum)*

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Sosialunevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Sosiala nevnd 14. september 2021:**
Jónleyg Eyðunsson greiddi frá tørvinum og ætlaninum um at broyta/tillaga hølini til tørvin.
Forkv. í sosialunevnd Jónleyg J. Bech mælir til at taka undir við tilmælinum hjá stýrinum fyri BVT, at tillaga verandi høli til tørvin og víðkað um leigusáttmálan samsvarandi. Einmælt samtykt. Málið verður beint í Fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 27. september 2021:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælið hjá Sosialunevnd. Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 30. September 2021**
Forkv. í sosialunevnd Jónleyg J. Bech, sum er limur í stýrinum fyri barnaverndina, greiddi frá um tørvin hjá barnaverndini at dagføra hølisumstøðurnar. Einmælt samtykt at fylgja tilmælið hjá Sosialunevnd og Fíggjarnevndini.

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tværávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

## 50/21 Umsókn um frávik í byggisamtyktini til íbúðarbygginga -Matr.nr 502a, Kirkjubrekkan

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 15.09.2021 | 49/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 10. September 2021)**
Umsitingin hevur móttikið ávegis umsókn um bygging av íbúðum á matr. nr. 502a, ið liggur sunnan fyri Kirkjubrekkuna, og er ogn hjá Una Persson.

Grundøkið er avlagt samb. byggisamtyktini §20, sum verandi Øki A. Miðstaðarøki.

1) *Økið verður lagt av til miðstaðarbygging, t.e. handlar, skrivstovur, samkomuhøli, heilsubótarstovur, gistingarhús, matstovur, smærri handverksfyritøkur o.t. Byggimyndugleikin kann geva loyvi til at innrætta eina íbúð til virkiseigara ella starvsfólk.*
2) *Byggistigið má ikki fara upp um 0,6.*
3) *Nettonýtslustigið má ikki fara upp um 1,0. Tó kann tað fyri grundstykkir, sum eru 200 m² ella minni fara upp til helvtina hægri og fyri stykkir millum 200 m² og 500 m², verður nettonýtslustigið fastlagt í mun til víddina á grundstykkinum soleiðis, at nettonýtslustigið er 1,5 fyri grundstykki til víddar 200 m2 minkandi lutfalsliga til 1,0 fyri grundstykki upp til vídd 500 m2.*
4) *Hús mugu einans verða bygd í mesta lagi í 3 hæddum við nyttum lofti og ikki vera hægri enn 10 m til yvirgrindina og 13 m til mønuna mált frá meðaljørðildi (meðal við húsahornini). Kjallari verður roknaður sum húsahædd um so er, at loftið er meira enn 1,0 m oman fyri hægsta jørðildi við húsahorn. Bert ein kjallarahædd má vera.*
5) *Frávik kunnu verða gjørd frá ásetingunum í stk. 2, 3 og 4 í serstakari byggisamtykt fyri hóskiligt, natúrliga avmarkað øki. Tó kann nettonýtslustigið fyri økið sum heild ikki fara upp um 2,0*

**Lógargrundarlag:** Almenn byggisamtykt fyri Tvøroyrar Kommunu, soleiðis samtykt av Tvøroyrar Býráð tann 12. februar 2013 og 20. mars 2013.

**Fíggjarligar avleiðingar:** Ongar

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Teknisku nevnd og møguliga býráðnum til støðutakan
Viðmerking Lasse: stk 1) má broytast til eisini at umfata bústaðarbygging.

**Tekniska nevnd 15. september 2021:**
Frávik kann ikki gevast. Men skal eina broytning til í byggisamtyktini til, fyri at hettar skal vera møguligt. Einmælt samtykt at gera eina broyting í byggisamtyktini og leggja málið fyri býráði.

**Býráðið 30. September 2021**
Einmælt samtykt at umsitingin fremur broyting í økinum A "Miðstaðarøkið", soleiðis at orðingin bústaðir verður positiv nevnt í byggisamtyktini fyri A Miðstaðarøkið.

## 51/21 Starvsfólkadagur/jólaborðhald 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 27.09.2021 | 53/21 |
| 2 Býráðið | | |

**Málslýsing: (Kommunustjórin)**
Borgarstjórin mælir til at skipa verður fyri felags starvsfólkadegi/jólaborðhaldi fyri øll starvsfólk hjá Tvøroyrar kommunu 20. Nov. 2021.

Vanliga hevur verði skipa fyri starvsfólkadegi/jólaborðhaldi, men orsaka av støðuni við Corona hevur ikki verði skipa fyri hesum síðani des. 2019.

**Lógargrundarlag:** Kommunufultrúin

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2021, §516, Vitjan og umboðan avsett kr. 200.000,-

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 27. september 2021:**
Einmælt samtykt at umsitingin skipar fyri felags starvsfólkadegi/jólaborðhaldi fyri øll starvsfólk hjá Tvøroyrar kommunu leygardagin 20. november. Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 30. september 2021:**
Einmælt samtykt, at fylgja tilmælið hjá borgarstjóranum og umsitingini.

## 52/21 Barnaverndartænastan BVT -eykajáttan 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 23.04.2021 | 14/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.05.2021 | 25/21 |
| 3 Býráðið | 27.05.2021 | 34/21 |

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 14.09.2021 | 23/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 27.09.2021 | 49/21 |
| 3 Býráðið | | |

**Málslýsing: Kommunustjórin 9. September 2021**
Forkv. í Sosialunevn ynskir at viðgerða fíggjarstøðuna og evt. eykajáttan til BVT fyri 2021. Á fundinum luttaka Amy Bech fíggjarleiði hjá TVK. og Jónleg Eyðunsson leiðari fyri BVT.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 30 frá 26. mars 2021 (Barnaverndarlógin)

**Fíggjarligar avleiðingar:** Eykajáttan fyri FÆ2021

- *TVK hevur samlaða játtan á kr. 2.54 mió. til BVT í FÆ2021 samsvarandi 37,54% av rakstrinum fyri BVT (Býtislykilin er eftir fólkatalinum)*

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Sosialunevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Sosiala nevnd 14. september 2021:**
Jónleyg Eyðunson og Amy Bech greiddi frá málinum.

- Neyðugt er at veita eykajáttan til BVT svarandi til kr. 1.68 mio. Av hesum ber Tvøroyrar kommuna 37,54% svarandi til kr. 631.242,-
- Umsorganar mál eru høvðus orsøkin til tørvin á eykajánn á kr. 1.2mió, og lønarútreiðslurnar eru øktar við 478tkr., sum stava frá tímiønt til konsulentar: fosturforeldur, stuðlar, sálarfrøðing og nakað til fyrisiting.

Mælt verður til at eykajáttan verður veitt av innistandandi, og málið verður beint í Fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 27. september 2021:**
Einmælt samtykt at Tvøroyrar kommuna ber meirkostnaðin samsvarandi býtislyklinum 37,54% (kr. 631.242,-), ið verður fíggja av innistandandi. Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 30. September 2021**
Forkv. í Sosialunevnd Jónleyg J. Bech, sum er limur í stýrinum fyri barnaverndina, greiddi frá um arbeiði í barnaverndartænastuni. Einmælt samtykt at takan undir við tilmælinum hjá Fíggjarnevndini. Málið skal hava 2. viðgerðir.

## 53/21 Barnaverndartænastan BVT -hagtøl 2020

### BARNAVERNDARTÆNASTAN BVT -HAGTØL 2020

**Málslýsing: (Kommunustjórin 11. September 2021)**
Forkv. í sosialunevnd ynskir viðgerð og kunning um hagtøl fyri Barnaverndartænastuna BVT. Til málsviðgerðina luttakur Jónleg Eyðunsson leiðari fyri BVT.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 30 frá 26. mars 2021 (Barnaverndarlógin)

**Fíggjarligar avleiðingar:** Fíggjarætlan FÆ2022

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Sosialunevnd og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 30. September 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

Til kunningar

## 25/21 21/00035-1 Skattatøl 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 21.01.2021 | 1/21 |
| 2 Býráðið | 28.01.2021 | 2/21 |
| 3 Fíggjarnevndin | 19.02.2021 | 2/21 |
| 4 Býráðið | 01.03.2021 | 4/21 |
| 5 Fíggjarnevndin | 22.04.2021 | 4/21 |
| 6 Býráðið | 26.04.2021 | 8/21 |
| 7 Fíggjarnevndin | 20.05.2021 | 5/21 |
| 8 Býráðið | 27.05.2021 | 9/21 |
| 9 Fíggjarnevndin | 14.06.2021 | 7/21 |
| 10 Býráðið | 16.06.2021 | 12/21 |
| 11 Fíggjarnevndin | 23.08.2021 | 9/21 |
| 12 Býráðið | 26.08.2021 | 20/21 |
| 13 Fíggjarnevndin | 27.09.2021 | 10/21 |
| 14 Býráðið | | |

**Málslýsing:** Samanbering av skattainntøkum í 2021

**Kommunustjórin 01.03.2021**

- Til kunningar/umrøðu eru samanberingar av skattainntøkum

**Býráðið 30. September 2021:**
Málið var umrøtt og kunna

# 26/21 Kunning - IRF-Ársaðalfundur 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 25.03.2021 | 23/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 27.09.2021 | 11/21 |
| 3 Býráðið | | |

**Málslýsing: (Kommunustjórin 23.03.2021)**
Umsitingin hevur móttikið brævfrá IRF, sum kallar inn til Ársaðalfund onsdagin. 21. apríl 2021 kl. 10.30 á Hilton Garden Inn, Tórshavn.

Limakommunurnar eru umboðara av øll býráðslimum til aðalfundin, har hvør kommuna, undirskrivar fulltrúarváttan til býráðslim við atkvøðurættisambært viðtøkum felagsins 12. grein, 5. stk., ið skal sendast aftur til skrivstovu felagsins áðrenn aðalfundin.

Heitt verður á luttakarar um at fráboða luttøku í góðari tíð

Dagsskrá sambært 7. grein í viðtøkum felagsins:

1. Framløga av virki felagsins í farna roknskaparári
2. Framløga av grannskoðaðum ársroknskapi til góðkenningar
3. Val av nevnd, sí grein 14 í viðtøkum felagsins
4. Val av grannskoðara, ið skal vera ríkisviðurkendur
5. Framløga av broyttari fíggjarætlan fyri 2021 og fíggjarætlan fyri 2022 til góðkenningar
    5.1. Frágreiðing um íløguætlanina fyri 2021 og 2022
6. Uppskot til nýggja reglugerð hjá IRF um burturkast
7. Mál, sum nevndin ella lutaeigararnir vilja hava til viðgerðar

**Vegna nevndina hjá IRF**

Poul Andrias Joensen, stjóri

**Býráðið 25. marts 2021:**

Kristin Mikkelsen skjýtir upp at geva fulltrú til Anitu Vibergsdóttir at atkvøða vegna Tvøroyrar Býráð á aðalfundinum hjá IRF. Og Kristin Michelsen mælir til Alvi Mortensen verður í uppskotið til nevndar lim fyri Suðuroynna.
Einmælt samtykt

---

**Kommunustjórin 9. september 2021.**
Kunning um limagjøld fyri 2021 og fundarfrágreiðing frá ársaðalfundi

**Fíggjarnevndin 27. september 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað, málið verður beint í býráðið

**Býráðið 30. september 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

## 27/21 Føroya Bjór -umsókn um leigu av Koldepotinum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 27.09.2021 | 52/21 |

**Málslýsing: (Kommunustjórin)**
Borgarstjórin hevur móttikið umsókn um leigu av Koldepotinum frá Føroya Bjór, sum eisini hevur lati uppskot til leigusáttmála

**Lógargrundarlag: (Kommunufulltrúin)**

**Fíggjarligar avleiðingar:** Útreiðslur fyri TVK eru ongar. Leiguinntøkur/ár kr. 40.650,- Leigugjaldið, árliga leigan er sett til kr.150,00 pr. fermetur. Kortvídd samb. kortal er ásett til 271 m2. Leigarin rindar ravmagnsútreiðslur. Leigarin rindar oljuútreiðslur. Leigutíð ynskið er 10 ár.

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 27. september 2021:**
Einmælt samtykt at leiga matr.nr. 497b (vestari lon av Koldepotinum) til Føroya Bjór, samb umsókn og leigusáttmála. Málið verður beint í býráðið sum kunning.

**Býráðið 30. september 2021:**
Málið var umrøtt og kunnað

Fundurin lokin kl. 18:20

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Jónleyg Jespersen Bech

Bjarni Hammer

Kristina Roest

Súsanna Bertholdsen